

*Spekulatión hevur tvífaldað veiðitrýstið undir Føroyum. Landsstýrismenn, sum hava umsitið fiskivinnuna, hava havt ov lætt spæl, og Løgtingið hevur ikki havt dirvi og evni at steðga teimum. Løgtingið er stóri syndarin í øllum hesum, sigur fyrrverandi løgtingsmaðurin Ivan Johannesen, sum eisini hevur umsitið fiskivinnumál í landsstýrinum*

# Spekulatión hevur tvífaldað veiðitrýstið

**Grundhugsanin við fiskidagaskipanini er fullkomuliga avskeplað av, at menn eru farnir at spekulera í skipanini og gera hana til forrætning. Eitt úrslit er, at veiðitrýstið er tvífaldað í mun til tað, sum var, tá skipanin var sett í verk, sigur Ivan Johannesen, sum var landsstýrismaður við fiskivinnumálum, tá fiskidagaskipanin varð gjørd**

FISKIDAGAR
*Edvard Joensen, edvard@sosialurin.fo*

Fiskidagaskipanin er innanholað av spekulatión av monnum, sum einki annað hava við fiskivinnu at gera, enn at teir vilja vinnar léttar pengar burtur úr at útnytta skipanina.

So greiður er Ivan Johannesen, fyrrverandi løgtings- og landsstýrisamaður og ein av fiskidagafedrunum, í síni metan av tí, sum farið er fram í føroyskari fiskivinnu, síðan fiskidagaskipanin varð sett í verk í 1996.

Fiskidagaskipanin varð gjørd og samtykt, meðan Ivan Johannesen sat sum landsstýringsmaður við fiskivinnumálum. Hon varð sett í gildi beint eftir, at landsstýrið, hann sat í, hevði lagt frá sær.

Ætlanin við fiskidagaskipanini var góð, og hon hevði eisini virkað eftir ætlan, um vit ikki høvdu politikarar, sum bara siga ja, tá strongt verður á teir, men heldur høvdu orkað at staðið móti trýsti. Tí sannleikin er, at tann góða fiskidagaskipan, vit áttu at havt í Føroyum, er farin heilt í spønir av spekulatión frá monnum, sum einki hava við vinnuna at gera og heldur ikki hava skil fyri fiskivinnu, sigur Ivan Johannesen.

## Gjørd av neyð

Fiskidagaskipanin var ein neyðug loysn, sum gjørd varð fyri at sleppa burtur úr eini óbrúkiligari kvotaskipan, sigur Ivan Johannesen.

Tá Føroyar fóru á húsagang, sum hann tekur til, varð sett sum ein av mongum treytum, at tað bara skuldu fiskast 6.000 tons av toski undir Føroyum. Og tí bar slett ikki til at liva við, sigur hann.

Hinvegin er tað soleiðis, at kvotaskipan kann ikki brúkast undir Føroyum, tí her kann ikki fiskast »reint«. Tú kanst ikki siga, at har og har livir bara toskur, hýsa ella upsi. Her er alt meira ella minni samanblandað, og tískil sóu vit hesa nógv umtalaðu útblakingarnar, tá ov nógv var fiskað av summum sløgum.

Landsstýrið setti seg í samband við ein kanadiumann, sum varð mettur sum ein altjóða kapasitetur á fiskifrøðiliga økinum. Hann metti støðuna á Føroyagrunninum soleiðis, at tað átti at bera til at trýfalda toskaveiðuna til 18.000 tons.

Hesum valdu føroyingar so at fylgja, men hildu samstundis, at kvotaskipanin átti at verða avtikin, og ein dagaskipan, har tú kundi fiska øll fiskasløg í avmálda tí, var betri egnað, greiðir Ivan Johannesen frá.

## Avlagað

Men girndin gjørdi skjótt um seg, og menn fóru at skava til sín fyri at fáa skjótan peningaligan vinning burtur úr hesi skipanini. Serliga menn, sum ikki høvdu nakað við fiskivinnu at gera annars, sigur Ivan Johannesen. Og politikararnir vóru ikki nóg sterkir til at steðga hesum beinanveg.

Úrslitið er, at í dag er fiskidagaskipanin so avlagað, at hon er ikki til at kenna aftur. Og ein stóran part av skuldini eigur Løgtingið, sum hevur gjørt hetta lógligt, staðfestir fyrrverandi løgtings- og landsstýrismaðurin.

Løgtingið hevur bara verið eitt avgreiðslukontór hjá teimum landsstýrismonnunum, sum hava umsitið fiskivinnuna og gjørt við málsøkið, sum teimum lysti.

Ivan Johannesen dylur ikki fyri, at hann ikki heldur fólkafloksmenninar, sum hava umsitið fiskivinnumál í landsstýrinum, hava verið sína uppgávu vaksnir. Teir hava avlagað skipanina til nakað, sum ongantíð var ætlanin við henni.

–Men størsti syndarin er Løgtingið, sum ikki hevur torað at steðga teimum, sigur hann.

## Hvør trýbekkur uppmáldur

Tað hevur verið beinleiðis svansað við hesum almenna tilfeinginum. Menn hava sitið við skriviborð her og har og spekulera í, hvussu teir sum skjótast kundu vinna léttar pengar burtur úr hesi annars góðu skipan, sigur Ivan Johannesen.

Hvør trýbekkur varð máldur upp. Gamlir Grønlandsbátar vóru tiknir út úr niðurfalnum neystum. Og tá ringast var, varð eisini okkurt sokkið vrak flotað aftur. Alt samalt til at gera um til kubikmetrar fyri at fáa lagt saman til fiskiloyvi til einhvønn størri bát, teir skuldu hava.

Og skipanin varð bara meira og meira avskeplað. Rópt varð upp á umsetiligheit, sum skuldi vera tað sáliggerandi. Men tað virkar beint øvugt, sigur Ivan Johannesen.

Tað var ongantíð ætlanin við skipanini, at tað skuldi handlast við døgum millum ymsu bólkarnar, sum tað nú verður gjørt, nú vanligt er vorðið, at hesir somu trýbekkar og flaknaðu Grønlandsbátar eru vorðnir til nýmótans línuskip.

–Vit funnu fram til, hvat fiskað var undir Føroyum seinasta tíggju árini undan, at fiskidagaskipanin varð gjørd. Síðan var tað býtt til ymsu bólkarnar eftir tí leisti, sum vinnan hevði brúk fyri. Vit vistu, hvat trýst grunnarnir toldu, og vildu við hesi skipanini halda okkum á tí støðinum, sigur Ivan Johannesen.

Men síðan spekulatiónin er komin uppí, er veiðitrýstið á Føroyagrunninum í minsta lagið tvífaldað. Tí her sita menn, sum ikki hava skil fyri slíkum, og rokna veiðitrýst í kubikmetrum. Teir hava ikki ánilsi av, hvat teir gera, sigur hann.

## Ringt at rudda

Ivan Johannesen óttast fyri, at her er longu komið so langt, at tað verður ringt at rudda upp í hesum hurlivasanum. Og tað ringasta er, at tað tykist ikki, sum tað er politiskt dirvi í Føroyum til at fáa skil á hesum óskilinum.

–Tað er heilt víst, at tað ber ikki til at halda fram, soleiðis sum nú verður gjørt. Tað endar galið, staðfestir fyrrverandi landsstýrismaðurin.

Tað verður neyðugt at taka alt hetta upp til nýggja viðgerð, staðfestir Ivan Johannesen og heitir samstundis á politikararnar um at taka alt tilfarið framaftur. Men tað má gerast soleiðis, at veiðitrýstið aftur verður á slíkum støði, at grunnar og stovnar tola tað.

–Tað verður ikki lætt, men tað er neyðugt. Og í framtíðini má fiskidagaskipanin vera undir eftirliti og fylgjast upp alla tíðina, sigur Ivan Johannesen.